Eitt fullfíggjað róðrarfelag

Í gjár var sermerktur dagur hjá kappróðrarfelagnum Knørri í Havn. Tey sjósettu eitt nýtt fimmmannafar og eitt nýtt 10 mannafar, so nú hava tey eitt fullfíggjað kappróðrarfelag. Fimm-mannafarði eitur Tambar, meðan Ormurin Lagni er navnið á nýggja tíggjumannafarinum. Magnus Gaard í Knørri sigur, at hetta er ein sermerktur dagur hjá felagnum, tí nú kann felagið lata seg umboða í øllum bátastøddum í kappróðrinum. - Nú kunnu vit lutaka í øllum bátastøddum sum eitt fullfíggja kappróðrarfelag.

Tosa mikukvøldið

Síðani FSF gjørdi av, at Bartal Eliasen skuldi fáa leikbann í tveir dagar, hava spælarar, venjarar og leiðsla hjá ÍF ikki vilja gjørt viðmerkingar av nøkrum slag í fjølmiðlunum. Hetta tí tey søgdu seg óttast enn fleiri leikbann frá FSF. Mikukvøldið er Formula-bóltur aftur á skránni, og tá hevur Bartal Eliasen aftur loyvi at spæla. Og sambært formanninum í felagnum, Dan Petersen, verður sjálválagda talubannið hjá ÍF tá avtikið.

Fult í fyrstu royndunum

Undan kappingarbyrjan søgdu toftamenn seg vera misnøgdar við kappingarskránna, sum segði, at teir skuldu spæla tvær ferðir á útivølli ímóti ÍF, Skála og B71. Hetta vóru liðini, sum tað varð roknað við, at B68 skuldi kappast við fyri at sleppa undan niðurflytingarplássunum.

Nú hevur B68 spælt eina ferð á útivølli ímóti øllum hesum trimum. Á Skála vann B68 1-0, á Sandi vann B68 1-0, og nú vann B68 3-1 í Fuglafirði.

Í sjey teimum fyrstu umførunum skoraði B68 fimm mál. Tey trý málini í Fuglafirði í gjár bera við sær, at tað løgdust 60 prosent afturat málrúgvuni ella túgvuni hjá toftamonnum.

Símun aftur í ÍF verjuni

Fuglfirðingar vóru sjálvandi ikki nøgdir við teirra avrik hesa ferð. Fyritreytirnar vóru heldur einki serligar. Bartal Eliasen var leikbannaður, og hin miðverjin, Knút Vesturtún, var skaddur. Jonn Thomsen og Fritleif í Lambanum vóru miðverjar.

Eftir eitt korter noyddist Debes Danielsen at fara skaddur av vøllinum. Tá varð veteranurin Símun Eliasen skiftur inn, og liðið var umskipað: Dánial Pauli Højgaard varð fluttur av vinstra vongverja og fram í høgra borð, Fritleif í Lambanum varð fluttur úr miðverjuni og út á vinstra vongverja, og Símun Eliasen fór í miðverjuna at spæla saman við Jonn Thomsen.

Táið ÍF mikukvøldið fer at vitja HB í Gundadali, verður Bartal Eliasen leysur av leikbanninum, sum tvær tær seinastu ferðirnar hevur hildið hann uttanfyri.

Toftamenn hava veruliga fingið glið á. ÍF var annars favorittur undan sunnudegnum, men tað løgdu gestirnir líka í

ÍF-B68 1-3 (0-2):

B68 er orduliga í hopla

ÍF

B68

Senegalesisku spælararnir vístu vegin, tá ið óvuliga væl upplagdir toftamenn vóru sannførandi ímóti ÍF, sum ikki livdi upp til avrikini fyrr í ár

FÓTBÓLTUR

Jóannes Hansen
joannes@sosialurin.fo

Tað hevur verið í Fuglafirði, at bestu leikligu avrikini hava verið higartil í ár. ÍF hevur fleiri ferðir vístfínt spæl, uttan at tað hevur givið uppibornu úrtøkuna.

Og í góðveðrinum sunnudagin vóru tað toftamenn, sum vístu hugflogsríkt og sannførandi fótbóltsavrik í Fuglafirði. Serliga sannførandi var avrikið fyrra partin av 1. hálvleiki, tá ið B68 legði seg framum við tveimum málum.

- Hetta var avgjørt besta løtan hjá okkum higartil í ár, og tað man vera langt ímillum, at fótbóltur á hesum støðinum er at síggja her á okkara leiðum, helt væl nøgdi B68 venjarin, Bill Jacobsen, eftir lokið stríð.

Tað var hesa løtuna, at tað so rudduliga var staðfest, hvussu góðir senegalesisku spælararnir hjá B68 eru. Tað plagdi at verða sagt um suðurafrikanska Zuma, tá ið hann var liðfelagi hjá Toda Jónsson í FCK, at hann spældi betri og betri, sum dagarnir longdust og hitastigini hækkaðu, og at tað sást á avrikunum, tá ið heystið kom, dagarnir fóru at styttast, og kuldin kom í luftina.

Um hetta er soleiðis hjá senegalesisku B68 spælarunum fer tíðin at vísa. Men í góðveðrinum í Fuglafirði dusaðu teir sær. Teir hava góðan bóltførleika, og teir arbeiða fult og heilt fyri søkini. Teir flyta seg nógv, og teir eru ærukærir. Hvør einasti nærdystur kennist sum at vera alt avgerandi, teir eru skjótir, og teir hava gott eyga fyri at spæla saman við føroysku viðspælarunum.

Eftir tap í trimum teimum fyrstu umførunum hevur tað gingið sum eftir ánni hjá B68, og tað kann fara at gerast heilt spennandi hjá Bill Jacobsen og hansara monnum, sum ivaleyst hava meiri í sær, tá ið liðið verður meiri samanspælt. Niklas Joensen gerst alt tryggari á høgra vongverja, Jóhan Dávur Højgaard er stinnur og avgjørdur undir liðini á skilagóða veteraninum Arnbirni Danielsen í miðverjuni, og hóast venjingarstøðan ofta hevur verið betri, man Øssur Hansen framvegis vera ein tann besti vinstri vongverjin í landinum.

Jann Ingi Petersen er á miðvøllinum við at finna stevið aftur, sum í síni tíð bar landsliðsúttøku við sær, Kristian Anton Andreasen og Jóan Símun Edmundsson eru ágrýtnir og evnaríkir, og so eru tað ágrýtnu, arbeiðssomu og evnaríku útlendingarnir, ið binda sloyfuna saman.

Hesa ferð skoraðu senegalesarnir øll málini: Ndende setti hol á, tá ið hann vann luftdyst og síðani lyfti upp um Andres Gango, sum vardi ÍF málið væl og heilt vístvar besti heimamaðurin. Keita økti til 2-0, tá ið hann fangaði langa sending, sneiddi seg leysan og setti bóltin framvið málverjanum, og Keita staðfesti 3-1 sigurin, tá ið hann í høgru streyk avstað, legði alla verjuna aftur um seg og setti bóltin fram við málverjanum. Trý fín B68 mál, og serliga í 1. hálvleiki kundi B68 havt skorað tvey ella trý mál afturat, tá ið teir raktu bæði stólpa og tvørtræ.

ÍF svaraði aftur í 2. hálvleiki. Spenningur kom í, tá ið Høgni Madsen eftir horna minkaði um munin. Í eitt korter reið tað um snarið, tá ið álopini fóru báðar vegir, men tá ið Keita hevði skorað til 3-1 var tað greitt, at øll stigini skuldu út á Toftir.

- Eg kendi tað sum um, at tað var vandi fyri, at vit eftir fínu byrjanina skuldu missa sigurin. Tað var avgjørt ikki tilvitað, men tað vísir seg ofta, at tá ið leiðslan er 2-0, so hava spælararnir hug at toga í bremsuna. Teir høvdu fleiri vandamiklar deyðbóltsstøður, men tíbetur eydnaðist tað at varðveita leiðsluna, eisini tí at fremstu menninir hjá okkum alla tíðina lógu frammarlaga og hóttu í snarálopum, viðmerkti B68 venjarin.